# Kynsligur ágangur innan barna- og ungdómsarbeiði

## Sjónligheitsdagurin í Føroyum 2010

Í sambandi við Sjónligheitsdagin í Føroyum kemur Reimunn Førsvoll, rithøvundur av bókini „Fra synd, fra sorg, fra fare" til Føroya at halda fyrilestur og skeið um fyribyrgjan av kynsligum ágangi innan barna- og ungdómsarbeiði

### Innbjóðing

Tað er felagsskapurin ÁSÁ, ið er felagsskapur fyri árin av kynsligum ágangi, sum í sambandi við Sjónligheitsdagin skipar fyri skeiði og fyrilestri um fyribyrgjan av kynsligum ágangi innan barna- og ungdómsarbeiði. Fyrilestrar- og skeiðshaldari verður Reimum Førsvoll, rithøvundur av bókini „Fra synd, fra sorg, fra fare - Seksuelle overgrep i kirke og samfunn".

Reimunn Førsvoll førir okkum frá góðtrúni og óavvitandi inn í veruleikan, sum hann er hjá nógvum børnum og ungum. Børn og ung eru dagliga fyri ágangi av vaksnum persónum, sum misnýta tey kynsliga. Misnýtararnir eru at finna allastaðni, har børn og ung koma saman til tiltøk av ymiskum slagi, eisini innan kristnar felagsskapir.

Reimunn Førsvoll er úr Noregi. Hann er virkandi sóknarprestur í St. Johannes kirkjuni í Stavanger. Umframt gudfrøðiligur útbúgvingina er hann eisini útbúgvin lærari og familjuráðgevi. Í meira enn 20 ár hevur hann arbeitt við kynsligum ágangi.

Sjónligheitsdagurin verður hildin í Føroyum og Danmark á hvørjum ári. Í Føroyum verður hann hildin hvønn fyrsta leygardag í september. Umframt fyrilestur sjálvan Sjónligheitsdagin, verður eisini skeið um kynsligan ágang innan barna- og ungdómsarbeiði.

### Evnini, ið verða viðgjørd eru hesi

- hvat er kynsligur ágangur
- hvat er at fara yvir um mark kynsliga
- hvat ger tað við eitt menniskja
- hvussu kanst tú handfara slíkar sálarløstir (trauma)
- hvussu kann kynsligur ágangur fyribyrgjast

### Stutt um kynsligan ágang

Hóast øktan opinleika á nógvum økjum er insest og kynsligur ágangur framvegis nakað, sum vit ikki tosa opið um. Børn og ung verða útsett fyri kynsligan ágang í sambandi við barna- og ungdómsarbeiði, ágangi innan barna- og ungdómsarbeiði í kirkjum, samkomum og frítíðarvirksemi annars.

Fyrilesturin verður í Miðlahúsinum í Havn leygardagin 4. septembur frá kl. 13.00 – 17.00.

Skeiðið verður í Grúgvuni í Lamba fríggjadagin 3. septembur kl. 9.30 – 15.30

### *Um skeiðið:*

### Skeiðleiðari

Reimunn Førsvoll úr Noregi er virkandi sóknarprestur í St. Johannes kirkjuni í Stavanger. Umframt gudfrøðiligur útbúgvingina, er hann eisini útbúgvin lærari og familjuráðgevi. Í meira enn 20 ár hevur hann arbeitt við kynsligum ágangi.

### Málbólkar

- Prestar og samkomuleiðarar
- Øll, ið arbeiða millum børn og ung
- Øll, ið arbeiða við børnum og ungum innan frítíðarvirksemi
- Starvsfólk innan sosiala økið, ið arbeiða við børnum og ungum
- Lærarar
- Pedagogar og sálarfrøðingar
- Barnaverndartænastur og Barnatænastur
- Øll áhugað

### Staður

Grúgvan, á Byrgisheyggi 15, Lamba

### Eindagsskeið

Skeiðið er eindagsskeið

### Dagar

Fríggjadagur 3. septembur 2009 - kl. 09.30 - 15.30

### Kostnaður

Kr. 1000,- íroknað: Skeiðtilfar og máltíðir.

### Tilmelding

asa9909@gmail.fo
Tlf. 745049 - 216785 - 271779

***Gjaldið fyri skeiðið skal flytast á kontu í Norðoya Sparikassa 9865 – 1041562 og viðmerkjast Sjónligheitsdagurin.***

*Vegna ÁSÁ* Osla Sevdal tlf. 745049

Sosialurin 341800



# Restylane og Botox viðgerðir

17. og 18. september vitjar serfrøðingurin Kim Novaa.
Bílegging innan 1. september.

*Les meira á www.cosmeto.fo*

Cosméto
vakurleiki og vælvera

Niels Finsensgøta 38 • FO-100 Tórshavn • Telefon: 31 80 70 • www.cosmeto.fo

SUDOKU

## AUGUST KAPPINGIN

Hvønn dag í august mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan fríggjadagin 3. september 2010 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður fyrstu vikuna í oktober.
Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

**Vinnarin av Sudoku í juli:**
*Eyðbjørg Ellingsgaard*
*460 Norðskála*

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2 | 5 | | | | | 4 | |
| | | | 6 | 2 | | | | |
| 7 | | | | | 4 | | | 9 |
| | | 2 | 5 | 3 | | | | |
| | | 7 | | | | 5 | | |
| | | | | 6 | 9 | 1 | | |
| 1 | | | 8 | | | | | 5 |
| | | | | 7 | 6 | | | |
| | 3 | | | | | 6 | 2 | |

Cosméto
vakurleiki og vælvera

**Vinningurin hesaferð er frá Cosméto**

**Navn:** ____________________

**Bústaður:** ____________________

**Telefon:** ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

Sosialurin